# Umhvørvis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 7. oktober 2021 |
| Mál nr.: | 21/19980 |
| Málsviðgjørt: | jd |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar**

**Anordning om ikrafttræden for Færøerne af forskellige love om ændring af lov om luftfart**

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar hetta uppskot til *Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af lov om luftfart*

**Forslag til**

**Anordning om ikrafttræden for Færøerne af forskellige love om ændring af lov om luftfart**

**Anordning om ikrafttræden for Færøerne af ændringslove til lov om luftfart mm.**

VI MARGRETHE DEN ANDEN, af Guds Nåde Danmarks Dronning, gør vitterligt:

I medfør af § 3 i lov nr. 731 af 8. juni 2018 om ændring af lov om luftfart[1)] som ændret ved lov nr. xx af xx om ændring af lov om luftfart [Lovforslag nr. L 20 2021/2022 fremsat 6. oktober 2021: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Præcisering af rammerne for indskrænkninger i adgangen til luftfart og for tildeling af tilladelse til at udføre ruteflyvning, hjemmel til sikkerhedsgodkendelser m.v.)], § 3 lov nr. 2073 af 21. december 2020 om ændring af lov om luftfart[2)], og § 5 i lov nr. xx af xx om ændring af lov om luftfart [Lovforslag nr. L 20 2021/2022 fremsat 6. oktober 2021: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Præcisering af rammerne for indskrænkninger i adgangen til luftfart og for tildeling af tilladelse til at udføre ruteflyvning, hjemmel til sikkerhedsgodkendelser m.v.)][3)] bestemmes:

§ 1

I lov om luftfart, som sat i kraft for Færøerne ved kgl. anordning, jf. anordningsbekendtgørelse nr. 1373 af 4. december 2013, som ændret ved kgl. anordning nr. 1113 af 16. november 2015 og kgl. anordning 996 af 25. august 2017, foretages følgende ændringer:

**1.** *§ 3* affattes således:

»**§ 3**. Når hensynet til den offentlige sikkerhed, militære grunde eller særlige omstændigheder kræver det, kan transportministeren fastsætte regler om, at adgangen til luftfart inden for visse områder indskrænkes eller forbydes.

*Stk. 2.* Når den offentlige sikkerhed kræver det, eller der ellers foreligger ganske særlige omstændigheder, kan transportministeren fastsætte regler om, at adgangen til luftfart inden for hele eller dele af riget midlertidigt indskrænkes eller forbydes. Ministeren kan herunder fastsætte regler om betingelser for adgangen til luftfart inden for hele eller dele af riget.

*Stk. 3.* Transportministeren kan beslutte, at regler fastsat efter stk. 2 ikke indføres i Lovtidende, når karakteren af de i stk. 2 omhandlede omstændigheder nødvendiggør øjeblikkelig udstedelse. Sådanne regler offentliggøres i stedet på Transportministeriets hjemmeside.«

**2.** I *§ 10, stk. 2,* og *§ 11, stk. 2, litra c,* ændres »hans« til: »ejerens«.

**3.** I *§ 15* ændres »hans« til: »brugerens«.

**4.** I *§ 26, stk. 2,* ændres »han« til: »ministeren«.

**5.** I *§ 39* ændres i *1. pkt.* »han« til: »certifikatindehaveren«, og i *2. pkt.* ændres »Han« til: »Certifikatindehaveren«.

**6.** To steder i *§ 43, stk. 2,* og i *§ 47, 2. pkt.,* ændres »han« til: »luftfartøjschefen«.

**7.** I *§ 43, stk. 4,* ændres »Han« til: »Luftfartøjschefen«.

**8.** I *§ 45, stk. 2, 1. pkt., § 127, stk. 3, 2. pkt., § 149, stk. 1, 2. pkt.,* og *stk. 6, 1. pkt.,* og *§ 150 a, stk. 1, 1. pkt.,* ændres »ham« til: »vedkommende«.

**9.** I *§ 45, stk. 2, 2. pkt.,* to steder i *§ 50, stk. 2,* i *§ 132, stk. 2,* og *§ 149, stk. 6, 1.* og *3. pkt.,* ændres »han« til: »vedkommende«.

**10.** I *§ 47, 1. pkt.,* ændres »hans« til: »luftfartøjschefens«.

**11.** I *§ 50, stk. 6,* ændres »hans« til: »dennes«.

**12.** To steder i *§ 50, stk. 6,* og to steder i *§ 50, stk. 8, 1. pkt.,* ændres »han« til: »personen«.

**13.** I *§ 55, stk. 1, 2. pkt.,* indsættes efter »til«: »væsentlig«.

**14.** I *§ 57, stk. 2, nr. 8, litra a,* ændres »eller omlægning af driften, der indebærer« til: »omlægning af driften eller fysiske ændringer, der ikke er omfattet af § 55, stk. 1, og som indebærer«.

**15.** I *§ 57* indsættes som *stk. 3:*

»*Stk. 3.* Transport-, bygnings- og boligministeren kan fastsætte nærmere regler om service- og kapacitetsmål for flyvepladser, som er af vital betydning for Danmarks nationale og internationale trafikforbindelser, herunder regler om tilsyn med og håndhævelse af de fastsatte service- og kapacitetsmål.«

**16.** I *§ 60, stk. 1, 1. pkt.,* indsættes efter »offentligheden«: », og som ikke skal certificeres i henhold til EU-forordninger på flyvepladsområdet«.

**17.** *I § 70 a* indsættes efter stk. 1 som nyt stykke:

*»Stk. 2.* Transportministeren kan efter forhandling med justitsministeren fastsætte regler om, at personer, som udfører sikkerhedskontrol eller har adgang til sikkerhedsplaner i virksomheder, som er sikkerhedsgodkendt efter de forordninger om sikkerhed inden for civil luftfart, der er udstedt af Den Europæiske Union, skal sikkerhedsgodkendes af Trafikstyrelsen. Transportministeren kan endvidere fastsætte regler om ansøgning om, betingelser for samt meddelelse og tilbagekaldelse af sikkerhedsgodkendelser. Transportministeren kan endvidere efter forhandling med justitsministeren fastsætte regler om behandlingen af klassificerede oplysninger.«
Stk. 2-7 bliver herefter stk. 3-8.

**18**. I *§ 70 a* indsættes efter stk. 7, der bliver stk. 8, som stykke 9:

*»Stk. 9.* På Færøerne træffes afgørelse om sikkerhedsgodkendelse af det færøske landsstyre.«

**19.** *§ 75, stk. 1,* affattes således:

**»§ 75.** Transportministeren kan give tilladelse til regelmæssig luftfart i erhvervsøjemed over dansk område, medmindre særlige forhold taler imod.«

**20.** I *§ 111, stk. 1* og *2,* ændres »113.000« til: »128.821«.

**21.** I *§ 111, stk. 3,* ændres »4.694« til: »5.346«.

**22.** I *§ 111, stk. 4, 1. pkt.,* ændres »1.131« til: »1.288«.

**23.** I *§ 111, stk. 5, 1. pkt.,* ændres »19« til: »22«.

**24.** I *§ 130, stk. 1, 1. pkt.,* ændres »ham« til: »ejeren«.

**25.** *§ 148, stk. 1 og 2,* affattes således:

»Luftfartsselskaberne betaler en afgift til Trafik-, Bygge- og Boligstyrelsen på 4,75 kr. for hver passager, som selskabet befordrer. Afgiften betales for passagerer, som rejser med et luftfartøj, der er godkendt til mere end 10 passagersæder, eller som har en maksimal startvægt på mere end 5.700 kg, og som afgår fra en dansk flyveplads, hvis benyttelse til flyvning står åben for offentligheden, jf. dog stk. 3.

*Stk. 2.* Den afgift, som er nævnt i stk. 1, dækker omkostninger forbundet med Trafik-, Bygge- og Boligstyrelsens opgaver vedrørende tilsyn med civil luftfart, herunder tilsyn med aktører,

der ikke er pålagt afgiften i medfør af stk. 1, men hvis aktivitet har betydning for luftfartspassagerernes sikkerhed.«

**26.** I *§ 148, stk. 1, 1. pkt.,* ændres »4,75« til: »5,00«.

**27.** I *§ 148, stk. 1, 1. pkt.,* indsættes efter »befordrer«: », undtagen for passagerer befordret i perioden 1. juni 2021 til 31. december 2021«.

**28.** *§ 148, stk. 1,* affattes således:

» Luftfartsselskaberne betaler en afgift til Trafikstyrelsen på 6,00 kr. for hver passager, som selskabet befordrer. Afgiften betales for passagerer, som rejser med et luftfartøj, der er godkendt til mere end 10 passagersæder, eller som har en maksimal startvægt på mere end 5.700 kg, og som afgår fra en dansk flyveplads, hvis benyttelse til flyvning står åben for offentligheden, jf. dog stk. 3.«

**29.** I *§ 148, stk. 3, stk. 4, 1. pkt.,* og *stk. 6 og 7,* ændres »stk. 2« til: »stk. 1«.

**30.** I *§ 148, stk. 4,* indsættes efter 2. pkt. som nyt punktum:
»Beløbet reguleres uanset 1. pkt. første gang den 1. januar 2025.«

**31.** I *§ 148, stk. 4, 3. pkt.,* der bliver 4. pkt., udgår »hvert år«.

**32.** I *§ 149, stk. 4, 3. pkt.,* og *stk. 10, 2. pkt.,* ændres »ham« til: »arbejdsgiveren«.

**33.** I *§ 149, stk. 12,* ændres »§ 57« til: »§ 57, stk. 1 og 2«.

**34.** I *bilag 1, § 95, stk. 3,* ændres »han« til: »befordreren«.

**§ 2**

*Stk. 1* Anordningen træder i kraft 31. december 2021, jf. dog stk. 2-4.
*Stk. 2.* Anordningens § 1, nr. 1, 19 og 27, træder i kraft den 1. januar 2022.
*Stk. 3.* Anordningens § 1, nr. 26, træder i kraft den 1. januar 2023.
*Stk. 4.* Anordningens § 1, nr. 28, træder i kraft den 1. januar 2025.
*Stk. 5.* Regler fastsat i medfør af § 70 a, stk. 2-4, forbliver i kraft, indtil de ophæves eller afløses af forskrifter udstedt i medfør af luftfartslovens § 70 a, stk. 3-5.

*Givet på Christiansborg Slot*

Under Vor Kongelige Hånd og Segl

REGENT.

/ Transportministeren

1) Bestemmelsen er sålydende: »**§ 3.** Loven gælder ikke for Færøerne og Grønland, men kan ved kongelig anordning helt eller delvis sættes i kraft for Færøerne og Grønland med de ændringer, som de henholdsvis færøske og grønlandske forhold tilsiger.«.

2) Bestemmelsen er sålydende: » **§ 3.** Loven gælder ikke for Færøerne og Grønland, men kan ved kongelig anordning helt eller delvis sættes i kraft for Færøerne og Grønland med de ændringer, som de færøske og grønlandske forhold tilsiger.
3) Bestemmelsen er sålydende: » **§ 5.** Loven gælder ikke for Færøerne og Grønland, men kan ved kongelig anordning helt eller delvis sættes i kraft for Færøerne og Grønland med de ændringer, som de færøske og grønlandske forhold tilsiger.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Loftferðslulógin fyri Føroyar *(Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om luftfart*[1]) frá 2013 er seinast dagførd í 2017. Síðani eru fleiri broytingar gjørdar í donsku loftferðslulógini. Hesar broytingar eiga at verða settar í gildi fyri Føroyar, so samsvar er millum lóggávuna í Føroyum og Danmark.

Serliga viðkomandi eru broyttu reglurnar um sonevnda safety-gjaldið, sum skulu koma í gildi 1. januar 2022. Víst verður til *Galdandi lóggáva, pkt. 1.2.1.*

Umframt broytingar í reglunum um safety-gjald verður hámarkið fyri endurgjaldsábyrgd fyri ferðafólkaflutning, farmaflutning og viðføri stillað, eins og málsligar tillagingar verða gjørdar, so orðavalið í lógini er kynsneutralt.

### 1.2. Galdandi lóggáva

*1.2.1. Safety-gjaldið*

Í loftferðslulógini er ásett, at flogfeløg skulu rinda eitt gjald (safety-gjald) fyri hvørt ferðafólk, sum flogfelagið flytur. Safety-gjald verður ikki rindað fyri ferðafólk, ið eru yngri enn tvey ár, transit- og transferferðafólk og ferðandi starvsfólk hjá flogfelagnum.

Øll flogfeløg, bæði national og útlendsk, rinda gjaldið. Gjaldið er tað sama fyri øll flogfeløg og vanliga verður gjaldið lagt afturat kostnaðinum fyri ferðaseðilin. Í roynd og veru rinda ferðafólkini tískil safety-gjaldið.

Safety-gjaldið fíggjar kostnaðin av tí eftirliti, sum Trafikstyrelsen hevur við sivilari flogferðslu, undir hesum eisini eftirlit við teimum, sum ikki skulu rinda safety-gjald, men hvørs virksemi kortini hevur týdning fyri flogtrygdina. Hesi eru eitt nú flogfeløg, sum bara fáast við farmaflutning, privat vinnurekandi, sum veita ymsar tænastur til flogvinnuna, smærri privatflogfør, flogskiparar, flogleiðarar, tøknilig starvsfólk, t.d. mekanikarar, verkstøð, flogvøllir, dronuførarar o.o.

Safety-gjaldið varð fyrstu ferð ásett í 2013. Tá varð ásett, at gjaldið (satsurin) skuldi vera 6,00 kr. fyri hvørt ferðafólk. Samstundis varð ásett, at gjaldið sjálvt skuldi stillast á hvørjum ári eftir eini reguleringsskipan, sum er nágreinað í loftferðslulógini. Inntøkurnar av gjaldinum skulu fíggja kostnaðin av eftirlitinum, og tí skal skipanin í miðal hvørki geva yvirskot ella undirskot. Safety-gjaldið hevur síðani 2013 verið millum 4,50 kr. og 6,25 kr. fyri hvørt ferðafólk. Satsurin sjálvur er broyttur nakrar ferð síðani 2013. Í Føroyum var seinasta stillingin gjørd í 2016, tá satsurin varð ásettur at vera 5,50 kr. fyri hvørt ferðafólk. Í 2020 var gjaldið 4,50 kr. fyri fyri hvørt ferðafólk.

Við lov nr. 731 af 8. juni 2018 om ændring af lov om luftfart (2018-lógin) varð satsurin í Danmark lækkaður úr 5,50 kr. til 4,75 kr. fyri hvørt ferðafólk. Henda lækking varð grundað á, at inntøkurnar av gjaldinum vóru hægri enn útreiðslurnar til eftirlitið. Av misgáum varð

[1] Anordningsbekendtgørelse nr. 1373 af 4. december 2013: Bekendtgørelse af anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om luftfart, sum seinast broytt við anordning nr. 996 frá 25. august 2017

territorialásetingin í hesi lógini ófullfíggjað, og henda broyting kundi tí ikki setast í gildi fyri Føroyar og Grønland við kongligari fyriskipan.

COVID-19 heimsfarsóttin hevði tíðliga í 2020 við sær stóra óvissu um, hvussu virksemið í flogvinnuni fór at vera í 2020 og komandi árini.

Ítøkiliga hevði COVID-19 heimsfarsóttin við sær, at inntøkurnar frá safety-gjaldinum í 2020 lækkaðu munandi vegna fallið í ferðafólkatalinum. Hetta gav í sjálvum sær undirskot í skipanini. Harumframt fór árliga stillingin at hava við sær eina munandi ójavnvág í skipanini, sum fór at røkka fleiri ár fram. Hetta er grundað á, at tað m.a. er ferðafólkatalið, sum tað var tvey ár frammanundan, sum er grundarlagið undir ásetingini av safety-gjaldinum. At ferðafólkatalið vegna COVID-19 í 2020 var so serliga lágt merkir, at safety-gjaldið í 2022 verður grundað á eitt óvanliga lágt ferðafólkatal. Afturat hesum er framvegis ávís óvissa um, hvussu skjótt flogvinnan tekur seg upp aftur eftir COVID-19.

Við støði í hesum mettu danir, at tað í einum tíðarskeiði upp á nøkur ár ikki var heppið at stilla satsin eins og frammanundan, tí tað fór at geva stór sveiggj í safety-gjaldinum frá ári til árs, og tí at sveiggini fóru ikki at vísa ta røttu myndina av aktuellu støðuni í flogvinnuni.

Við lov nr. 2073 af 21. december 2020 om ændring af lov om luftfart (2020-lógin) varð ásetingin um safety-gjaldssatsin tískil broytt soleiðis, at satsurin varð lagdur á upprunaliga stigið frá 2013 (6,00 kr.). Á henda hátt varð skipanin sett aftur á null, og stillingin fór frameftir at taka støði í upprunaliga satsinum. Samstundis varð lógarásetta stillingin útsett soleiðis, at satsurin verður stillaður fyrstu ferð 1. januar 2023 og síðani aftur tann 1. januar 2025. Tá verður roknað við, at sveiggini í flogvinnuni, orsakað av COVID-19, eru horvin, og tá fer stillingin av nýggjum av virka sambært upprunaligu ætlanini soleiðis, at skipanin í miðal javnvigar.

Lógarbroytingin frá 21. desember 2020, sum er lýst omanfyri, kann kortini ikki setast í gildi fyri Føroyar, tí 2018-lógin hevur ikki ta røttu territorialásetingina. Hetta merkir, at 2018-lógin kann ikki setast í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan, og tískil heldur ikki broytingarnar í 2020-lógin.

Av tí at broytingarnar í 2018-lógini ikki eru settar í gildi fyri Føroyar, er lækkingin úr 5,50 kr. til 4,75 kr. fyri hvørt ferðafólk ikki galdandi fyri fráferðir úr Føroyum. Úrslitið er, safety-gjaldið fyri fráferðir úr Føroyum framvegis skal roknast eftir satsinum upp á 5,50 kr. heldur enn 4,75 kr. Hetta, saman við lága ferðafólkatalinum, sum er partur av grundarlagnum undir útrokningini, fer at hava við sær, at safety-gjaldið fyri flogfeløg, sum flúgva úr Føroyum, verður hægri enn hjá flogfeløgum, sum flúgva úr Danmark, og hesi flogfeløg rinda tískil eitt hægri gjald til eftirlitið hjá Trafikstyrelsen enn onnur flogfeløg við heimstaði í danska ríkinum.

Við hesum ríkislógartilmæli verður tí skotið upp at seta í gildi fyri Føroyar broytingarnar í safety-gjaldinum, sum vórðu gjørdar í bæði 2018 og 2020. Í stuttum eru broytingarnar hesar:

Tann 1. januar 2022 verður satsurin lækkaður úr 5,50 kr. til 4,75 kr. fyri hvørt ferðafólk. Tann 1. januar 2023 verður satsurin hækkaður til 5,00 kr. At enda verður satsurin tann 1. januar 2025 hækkaður til 6,00 kr.

Samstundis verður kortini ásett, at safety-gjaldið ikki verður stillað fyrr enn 1. januar 2025, og tað merkir, at safety-gjaldið verður roknað eftir satsinum upp á 4,75 kr. fram til 1. januar 2025.

Ein treyt fyri, at broytingar í satsinum fyri safety-gjaldið kunnu verða settar í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan er, at territorialásetingin í 2018-lógini verður broytt. Tann broytingin varð løgd fyri Fólkatingið 6. oktober 2021. Tað uppskotið er eisini tikið við í hetta uppskot til ríkislógartilmæli, og talan verður sostatt um parallellar viðgerðir í Fólkatinginum og Løgtinginum.

*1.2.2. Hámark fyri endurgjaldsábyrgd*

Í § 111 í loftferðslulógini eru ásettar avmarkingar fyri teirri endurgjaldsábyrgd, sum flogfeløg hava. Hesar avmarkingar eru í samsvari við art. 21 og 22 í Montreal-konventiónini. Ásetingin verður brúkt, um ferðafólk fáa skaða ella lata lív, um ferðafólk eru seinkað, ella um viðføri ella ferðagóðs er seinkað, skatt ella horvið.

Bæði ES og einstøku limalondini, eisini Danmark, hava tikið undir við Montreal-konventiónini, og ES og limalondini býta heimildirnar sínámillum á teimum økjum, sum Montreal-konventiónin fevnir um.

Heimildirnar hjá ES eftir Montreal-konventiónini eru ásettar ES-fyriskipan (EF) nr. 889/2002 frá 13. mai 2002 um broyting í ES-fyriskipan (EF) nr. 2027/97 um endurgjaldsábyrgd hjá flogfeløgum í sambandi við vanlukkur (hereftir Endurgjaldsábyrgdarfyriskipanin).

Fyriskipanin, sum implementerar ásetingarnar um endurgjaldsábyrgd í Montreal-konventiónini, er bara galdandi fyri flogfeløg, sum hava heimstað í ES, og sum hava fingið loyvi at reka flogvinnu eftir ES-fyriskipan (EF) nr. 1008/2008 frá 24. september 2004 um felags reglur um rakstur av loftferðslutænastum í ES. Reglurnar galda bara í mun til loftvegis flutning av ferðafólkum og viðføri.

ES-limalondini hava sostatt heimildir í mun til flogfeløg, sum eru heimahoyrandi í londum uttan fyri ES, og í mun til ES-flogfeløg á teimum økjum, sum ikki eru fevnd av Endurgjaldsábyrgdarfyriskipanini, t.e. loftvegis farmaflutningur.

Í Danmark er økið skipað við kap. 9 í loftferðslulógini. Kap. 9 í loftferðslulógini er sostatt galdandi fyri grønlendsk og føroysk flogfeløg, eins og fyri flogfeløg úr triðjalondum. Harumframt er kap. 9 galdandi fyri allan loftvegis farmaflutning, eisini hjá flogfeløgum, sum eru heimahoyrandi í ES. Fyri føroysk flogfeløg er hámarkið fyri endurgjaldi í § 111 sett í gildi við kongligari fyriskipan nr. 905 frá 4. juli 2013 um ígildissetan fyri Føroyar av ymsum broytingarlógum til lóg um loftferðslu.

Hámarkið fyri endurgjaldsábyrgd eftir § 111 í loftferðslulógini er uppgivið í SDR (Special Drawing Rights). SDR er ein serlig eind, sum er ásett og roknað við støði í einum miðali av ymsum gjaldoyrum (USD, EUR, GBP og JPY), sum IMF almannakunnger. 1 SDR er pr. 28.

september 2021 9,1 DKK. Fimta hvørt ár tekur ICAO hámarkið fyri endurgjaldi til viðgerðar fyri at meta um, hvørt upphæddirnar eiga at verða stillaðar.

Eftir § 111, stk. 1 og 2 er hámarkið fyri endurgjaldsábyrgdini fyri skaða á ferðafólk 113.000 SDR. Flogfelagið hevur objektiva ábyrgd upp til 113.000 SDR uttan so, at ferðafólkið hevur medvirkað til skaðan. Fyri endurgjaldsupphædd, sum fer upp um 113.000 SDR, er talan um presumptiónsábyrgd (ábyrgd við øvigari próvbyrðu).

Fyri skaða, sum stendst av seinkingum eftir § 111, stk. 3 í loftferðslulógini, er endurgjaldshámarkið 4.649 SDR (presumptiónsábyrgd). Fyri skaða, sum stendst av mistum, skaddum ella seinkaðum ferðagóðsi eftir § 111, stk. 4 í loftferðslulógini, er ábyrgdin avmarkað til 1.131 SDR fyri hvørt ferðafólk. Fyri skaða á viðføri hevur flogfelagið objektiva ábyrgd upp til 1.131 SDR. Er viðføri seinkað, er talan um presumptiónsábyrgd.

Afturat hesum er endurgjaldsábyrgdin (objektiv ábyrgd) fyri skaða av mistum, skaddum ella seinkaðum farmi eftir § 111, stk. 5 í loftferðslulógini avmarkað til 19 SDR fyri hvørt kg.

Danmark hevur skyldu til at tryggja, at mørkini fyri endurgjaldsábyrgd, sum eru ásett í Montreal-konventiónini, verða sett í gildi fyri virksemi, sum ikki er skipað í Endurgjaldsábyrgdarfyriskipanini. Loftferðslulógini, galdandi fyri Føroyar, verður tí broytt samsvarandi broytingunum í Montreal-konventiónini: Í § 111, stk. 1-2, verður 113.000 SDR broytt til 128.821 SDR. Í § 111, stk. 3, verður 4.694 SDR broytt til 5.346 SDR. Í § 111, stk. 4, verður 1.131 SDR broytt til 1.288 SDR, og í § 11, stk. 5, verður 19 SDR broytt til 22 SDR.

*1.2.3. Málsligar tillagingar*
Skotið verður upp at strikað kynseyðmerkjandi orðini úr lógini. Eingin innihaldslig broyting stendst av hesum.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Uppskotið hevur til endamáls at dagføra galdandi lov om luftfart, som sat i kraft for Færøerne ved kgl. anordning, jf.  anordningsbekendtgørelse nr. 1373 af 4. december 2013, som ændret ved kgl. anordning nr. 1113 af 16. november 2015 og kgl. anordning 996 af 25. august 2017.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Víst verður til pkt. 1.3: Endamálið við uppskotinum.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá Atlantic Airways og Vága Floghavn. Uppskotið hevur eisini verið til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum í tíðarskeiðinum 20. oktober - 3. november 2021. Víst verður til hjálagda upprit um innkomnar viðmerkingar [Verður skrivað, tá hoyringarfreistin er farin]

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Broytingin í safety-gjaldinum hevur beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri flogfeløgini, men í roynd og veru verður gjaldið lagt afturat gjaldinum fyri ferðaseðilin. Sostatt eru tað ferðafólkini, sum gjalda.

Hækkingin av markinum fyri endurgjaldsábyrgd kann hava við sær fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna, um tryggingarfeløg av hesi orsøk hækka tryggingargjøldini, sum flogfeløgini rinda. Roknað verður kortini við, at fíggjarligu avleiðingarnar av hesum broytingum eru sera avmarkaðar. Hetta er grundað á, at broytingin einans viðvíkur sjálvum hámarkinum fyri teirri endurgjaldsábyrgd, sum kann áleggjast flogfelagnum, og ikki tí endurgjaldi, sum eitt flogfelag í ítøkiligum førum skal gjalda.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Eingin viðkomandi millumtjóðasáttmáli er á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður, at uppskotið er í samsvari við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli millum stjórn Íslands øðrumegin og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri hinumegin), *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sbr. Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sbr. Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at uppskotið fer at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir. Uppskotið ger heldur ikki størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Satsurin fyri sonevnda safety-gjaldið verður stillaður. Víst verður til pkt. 1.2.1., har gjølliga er greitt frá gjaldinum.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**

Uppskotið leggur ikki nýggjar skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismanni, stovn undir landsstýrinum ella til kommunurnar.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

*Til § 1, nr. 1*
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 1 í fylgiskjal 3: Lovforslag nr. L 20 / 2021-22: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Præcisering af rammerne for indskrænkninger i adgangen til luftfart og for tildeling af tilladelse til at udføre ruteflyvning, hjemmel til krav om sikkerhedsgodkendelser m.v.)

*Til § 1, nr. 2-12*
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 1-11 í fylgiskjali 2: 2020/1 LF 41: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Fastlæggelse af safetyafgiften og regulering af erstatningsansvarsgrænser) (Lov nr. 2073/2020)

*Til § 1, nr. 13*

Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 2 í fylgiskjali 1: 2017/1 LSF 154: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Service- og kapacitetsmål, oplysningspligt for flyvepladser, fastsættelse af safetybidrag m.v.) (Lov nr. 731/2018).

*Til § 1, nr. 14-15*
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 3-4 í fylgiskjali 1: 2017/1 LSF 154: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Service- og kapacitetsmål, oplysningspligt for flyvepladser, fastsættelse af safetybidrag m.v.) (Lov nr. 731/2018).

*Til § 1, nr. 16*
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 5 í fylgiskjali 1: 2017/1 LSF 154: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Service- og kapacitetsmål, oplysningspligt for flyvepladser, fastsættelse af safetybidrag m.v.) (Lov nr. 731/2018).

*Til § 1, nr. 17*
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 2 í fylgiskjal 3: Lovforslag nr. L 20 / 2021-22: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Præcisering af rammerne for indskrænkninger i adgangen til luftfart og for tildeling af tilladelse til at udføre ruteflyvning, hjemmel til krav om sikkerhedsgodkendelser m.v.)

*Til § 1, nr. 18*
Ásett verður, at Føroya landsstýri tekur avgerðir um trygdargóðkenningar. Í hesum føri er talan um góðkenningar av starvsfólkum í trygdareftirlitinum í Vága Floghavn. Starvsfólk hjá Atlantic Airways verða trygdargóðkend av Trafikstyrelsen.

Ítøkiliga merkir hetta, at tá ið starvsfólk skulu góðkennast at útinna trygdareftirlit á flogvøllinum, er tað landsstýrið, sum fær til vega upplýsingar og váttanir frá m.a. PET og politinum um viðkomandi. Treytað av, at einki forðar fyri tí, góðkennir landsstýrið síðani viðkomandi til at útinna trygdareftirlit.

*Til § 1, nr. 19*
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 3 í fylgiskjal 3: Lovforslag nr. L 20 / 2021-22: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Præcisering af rammerne for indskrænkninger i adgangen til luftfart og for tildeling af tilladelse til at udføre ruteflyvning, hjemmel til krav om sikkerhedsgodkendelser m.v.)

*Til § 1, nr. 20-23*
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 12-15 í fylgiskjali 2: 2020/1 LF 41: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Fastlæggelse af safetyafgiften og regulering af erstatningsansvarsgrænser) (Lov nr. 2073/2020)

*Til § 1, nr. 24*
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 16 í fylgiskjali 2: 2020/1 LF 41: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Fastlæggelse af safetyafgiften og regulering af erstatningsansvarsgrænser) (Lov nr. 2073/2020)

*Til § 1, nr. 25*

Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 8 í fylgiskjali 1: 2017/1 LSF 154: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Service- og kapacitetsmål, oplysningspligt for flyvepladser, fastsættelse af safetybidrag m.v.) (Lov nr. 731/2018).

*Til § 1, nr. 26*
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 4 í fylgiskjal 3: Lovforslag nr. L 20 / 2021-22: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Præcisering af rammerne for indskrænkninger i adgangen til luftfart og for tildeling af tilladelse til at udføre ruteflyvning, hjemmel til krav om sikkerhedsgodkendelser m.v.)

*Til § 1, nr. 27*
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 5 í fylgiskjal 3: Lovforslag nr. L 20 / 2021-22: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Præcisering af rammerne for indskrænkninger i adgangen til luftfart og for tildeling af tilladelse til at udføre ruteflyvning, hjemmel til krav om sikkerhedsgodkendelser m.v.)

*Til § 1, nr. 28*
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 6 í fylgiskjal 3: Lovforslag nr. L 20 / 2021-22: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Præcisering af rammerne for indskrænkninger i adgangen til luftfart og for tildeling af tilladelse til at udføre ruteflyvning, hjemmel til krav om sikkerhedsgodkendelser m.v.)

*Til § 1, nr. 29*
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 9 í fylgiskjali 1: 2017/1 LSF 154: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Service- og kapacitetsmål, oplysningspligt for flyvepladser, fastsættelse af safetybidrag m.v.) (Lov nr. 731/2018).

*Til § 1, nr. 30*
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 18 í fylgiskjali 2: 2020/1 LF 41: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Fastlæggelse af safetyafgiften og regulering af erstatningsansvarsgrænser) (Lov nr. 2073/2020)

*Til § 1, nr. 31*
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 19 í fylgiskjali 2: 2020/1 LF 41: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Fastlæggelse af safetyafgiften og regulering af erstatningsansvarsgrænser) (Lov nr. 2073/2020)

*Til § 1, nr. 32*
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 20 í fylgiskjali 2: 2020/1 LF 41: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Fastlæggelse af safetyafgiften og regulering af erstatningsansvarsgrænser) (Lov nr. 2073/2020)

*Til § 1, nr. 33*
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 10 í fylgiskjali 1: 2017/1 LSF 154: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Service- og kapacitetsmål, oplysningspligt for flyvepladser, fastsættelse af safetybidrag m.v.) (Lov nr. 731/2018).

*Til § 1, nr. 34*

Víst verður til serligu viðmerkingarnar til nr. 21 í fylgiskjali 2: 2020/1 LF 41: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Fastlæggelse af safetyafgiften og regulering af erstatningsansvarsgrænser) (Lov nr. 2073/2020)

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu. Ásett verður, at fyriskipanin kemur i gildi 31. desember 2021, sbr. tó niðanfyri.

Ásetingarnar í § 1, nr. 1 og 19 um avmarkingar í sambandi við loyvi at reka flogvinnu, og ásetingin í § 1, nr. 27 um undantak frá skylduni at rinda safety-gjald verða settar í gildi 1. januar 2022.

Ásetingin í § 1, nr. 26 um hækkan í safety-gjaldinum úr 4,75 kr. til 5,00 kr. fyri hvørt ferðafólk verður sett í gildi 1. januar 2023.

Ásetingin í § 1, nr. 28 um hækkan í safety-gjaldinum úr 5,00 kr. til 6,00 kr. fyri hvørt ferðafólk verður sett í gildi 1. januar 2025.

At enda verður ásett, at reglur, givnar við heimild í § 70 a, stk. 2-4 um at góðkenna trygdarstarvsfólk o.a. verða verandi í gildi, til tær verða settar úr gildi ella avloystar av reglum, givnar við heimild í § 70 a, stk. 3-5.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann

**Magnus Rasmussen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**

**Fylgiskjal 1:**
2017/1 LSF 154: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Service- og kapacitetsmål, oplysningspligt for flyvepladser, fastsættelse af safetybidrag m.v.) (Lov nr. 731/2018).

**Fylgiskjal 2:**
2020/1 LF 41: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Fastlæggelse af safetyafgiften og regulering af erstatningsansvarsgrænser) (Lov nr. 2073/2020)

**Fylgiskjal 3:**
Lovforslag nr. L 20 / 2021-22: Forslag til lov om ændring af lov om luftfart (Præcisering af rammerne for indskrænkninger i adgangen til luftfart og for tildeling af tilladelse til at udføre ruteflyvning, hjemmel til krav om sikkerhedsgodkendelser m.v.)